# Welcome on Board Norröna



SMYRIL LINE




## Vælkomin umborð á Norrönu

Vit eru takksom fyri, at tú valdi at ferðast við Norrönu, og vit kenna tað sum okkara skyldu at geva tær eina ógloymandi ferð.

Meðan vit føra skipið trygt yvir hav, kanst tú hvíla teg væl og uppliva nógv spennandi umborð. Og tað ger ikki mun, um tú ert í einingi ella ferðast við familju og vinum. Flaggskip Føroya goymir okkurt til øll!

Eitt er, at ferðaminnini verða mong. Annað er, at glaðu gestirnir aftaná lokna ferð fortelja, hvussu framúrskarandi tað var at finna friðin umborð, hvíla seg og hella nýggja orku á sál og sinn.

Okkara stásiliga skip hevur nettupp ivaleyst av høvum og støðum at taka sær av løttum. Og meðan tú savnar megi, syrgja vit fyri, at tú kemur úthvíldur á mál.

Tí siga vit: Lat strongd og stúran liggja eftir uttan ekka og ampa. Njót Norrönu, bæði meðan hon flytur teg burtur frá gerandisdegnum og heim aftur til tað, tú hóast alt elskar og saknar.

Av brúnni ynskja vit tær - vegna alla manningina og Smyril Line - eina vælsignaða ferð.

**Petur av Vollanum & Bogi Petersen**
*Skiparar á Norrönu*

## Welcome on Board Norröna

Prepare to embark on a journey filled with a wealth of experiences.

Whether you're sailing solo, with family, or accompanied by friends, our ship offers a multitude of opportunities to create cherished memories. As you sail with us, take the time to unwind and recharge.

Our ship provides ample opportunities for relaxation, ensuring you arrive at your destination fully rejuvenated. Leave behind the stresses of everyday life and embrace the tranquil ambiance of our vessel.

On behalf of the entire crew and Smyril Line, we extend our warmest wishes for a delightful journey with us. We are honored to have you on board and are committed to making your experience exceptional.

**Petur av Vollanum & Bogi Petersen**
*Captains, Norröna*

## Willkommen an Bord der MS Norröna

Willkommen an Bord! Ganz gleich, ob Sie allein, mit Ihrer Familie oder mit Freunden reisen – freuen Sie sich auf eine Reise voller unvergesslicher Erlebnisse. Unser Schiff bietet Ihnen eine Vielzahl von Möglichkeiten, um Ihre Zeit an Bord optimal zu nutzen.

Tauchen Sie ein in das Leben an Bord und freuen Sie sich auf das vor Ihnen liegende Reiseabenteuer. Nutzen Sie die Zeit Ihrer Überfahrt, um zu entspannen und frische Energie zu tanken.

Unser Schiff verfügt über verschiedene Angebote zur Erholung, damit Sie vollkommen entspannt Ihr Ziel erreichen. Lassen Sie den Alltagsstress hinter sich und genießen Sie die ruhige Atmosphäre an Bord unseres Schiffes. Im Namen der gesamten Besatzung und der Smyril Line wünschen wir Ihnen eine angenehme Reise.

Wir freuen uns sehr, Sie als unsere Gäste an Bord begrüßen zu dürfen, und sind bestrebt, Ihre Reise zu einem besonderen Erlebnis zu machen.

**Petur av Vollanum & Bogi Petersen**
*Kapitäne, Norröna*



# Reception

## Móttøkan á dekki 5

Alt samdøgrið stendur blíð og hjálpsom manning til reiðar í móttøkuni á dekki 5. Spyr um alt; til dømis um tað ber til at fáa eitt størri kamar, hvussu nógv tollfrítt ein kann keypa, ella hvar tú kanst goyma viðførið. Vit standa við opnum ørmum og eru til reiðar at greiða øll ivamál.

Eins og móttøkan er kioskin í móttøkuni altíð opin. Á hillunum standa munnbitar, okkurt drekkandi og vanligar neyðsynjarvørur. Hevur tú til dømis brúk fyri apoteksvørum? So kunnu vit eisini nøkta tann tørvin í ávísan mun.

Í móttøkuni fært tú eisini orðnað netsamband, biografbillettir og atgongd til heitu pottarnar.

## Reception on Deck 5

Our friendly reception team is here to assist you around the clock, ensuring you have a seamless experience. Whether you have general inquiries, need assistance with cabin upgrades, tax-free refunds, or require luggage boxes, we are at your service. In addition, we offer a range of convenient amenities.

Visit our kiosk for a selection of products, including snacks, beverages, and essential items. Need any pharmacy products? We have you covered. Stay connected with our Wi-Fi access, purchase tickets for the cinema, and indulge in the relaxation of our hot tubs. Please don't hesitate to reach out to our reception staff if you require any assistance or have any questions.

We are dedicated to making your stay with us as comfortable and enjoyable as possible.

## Die Rezeption auf Deck 5

Herzlich willkommen an der Rezeption auf Deck 5! Unser freundliches Empfangsteam steht Ihnen rund um die Uhr zur Verfügung und sorgt dafür, dass Sie einen perfekten Aufenthalt an Bord haben. Ob Sie allgemeine Fragen haben, Unterstützung bei Kabinen-Upgrades, Steuererstattungen oder Gepäckboxen benötigen - wir sind gern für Sie da. Darüber hinaus bieten wir eine Vielzahl praktischer Leistungen an.

Besuchen Sie unseren Kiosk, wo Sie eine Auswahl an Snacks, Getränken und Alltagsprodukten finden. Benötigen Sie Arzneimittel? Keine Sorge, hier haben wir ebenfalls etwas im Angebot. Buchen Sie Ihren Zugang zu unserem WLAN, erwerben Sie Tickets für das Kino und gönnen Sie eine Auszeit in unseren Hot Tubs. Zögern Sie bitte nicht, sich an unser Rezeptionspersonal zu wenden, falls Sie Unterstützung benötigen oder Fragen haben.

Unser Ziel ist es, Ihren Aufenthalt bei uns so angenehm und komfortabel wie möglich zu gestalten.




# Safety on Board

## Trygdin umborð

Meðan tú ert umborð hava tín heilsa, trygd og njóting okkara hægstu raðfesting. Fyrst vilja vit biðja teg kunna teg um títt savningarstað. Hendan kunning er at finna aftanfyri hurðina á kamarinum.
Rýmingarleiðin er eisini at síggja á kamarshurðini. Tað er tíbetur ósannlíkt, men skuldu vit komið í neyðstøðu, hoyrist ein ávaring um alt skipið. Ávaringin hevur **sjey stuttar** og ein **langan tóna**.

Hetta er eitt tekin um at lata seg í heit klæðir og góðar skógvar, og at hava heilivág við sær úr kamarinum. Síðani verður farið til savningarstaðið at heinta bjargingarvest. Tá tú ert komin til savningarstaðið, verður tú biðin um at siga einum av manningini frá, at tú ert møtt/ur. Vinarliga legg merki til, at lyfturnar ikki eru virknar í eini neyðstøðu.

Um tú skuldi fingið tørv á at ávara um neyðstøðu á túrinum, brót tá rútin á einum av reyðu kassunum til eldávaring, ið eru um alt skipið. Hetta sendir eina ávaring til brúnna. Tú hoyrir ikki ávaringina á staðnum. Hevur tú spurningar, ivamál, ella ynskir tú meiri kunning um okkara mannagongdir í samband við trygd, ert tú vælkomin at venda tær til okkara móttøkutoymið, ið altíð eru fús at hjálpa.

*Vit ynskja tær eina trygga ferð.*

## Safety on Board

While on board your health, safety and enjoyment are our top priority. First, we ask that you familiarise yourself with your assembly station information. You will find this information on the back of your cabin door. Your escape route is also detailed on your cabin door. In the unlikely event of an emergency, you will hear **seven short** blasts followed by **one long** blast of the ship's alarm and whistle.

This is your signal to put on warm clothing and sturdy footwear, and to take with you any medication you may need from your cabin. Then go to the assembly station to collect your life jacket. When you are at your assembly station, please make a member of the assembly station team aware. Please note that the lifts will not be in use during emergencies.

If, at any point during your cruise you need to raise the emergency alarm, just break the glass on any of the red fire alarms located around the ship. This will send an alert to the bridge. You will not hear the signal. If you have any questions, concerns or would like more information about our safety procedures, please contact our Reception Desk team, they are always happy to help.

*We wish you a safe voyage.*

## Sicherheit an Bord

Während Ihres Aufenthalts an Bord der MS Norröna sind Ihre Gesundheit, Sicherheit und Wohlbefinden unsere höchste Priorität. Bitte machen Sie sich nach Ankunft an Bord als Erstes mit den Informationen bezüglich der Sammelpunkte vertraut. Diese Information finden Sie, genauso wie die Beschreibung des kürzesten Fluchtwegs, detailliert auf der Innenseite Ihrer Kabinentür. Im unwahrscheinlichen Falle eines Notfalls hören Sie **sieben kurze** gefolgt von einem **langen Ton** des Schiffsalarms.

Dies bedeutet für Sie, sich bitte warm und mit festem Schuhwerk anzuziehen und eventuell benötigte Medikamente aus der Kabine mitzunehmen. Bitte begeben Sie sich dann direkt zu Ihrem Sammelpunkt, um Ihre Rettungsweste zu erhalten. Nach Ankunft am Sammelpunkt informieren Sie bitte ein Mitglied der Crew vor Ort, dass Sie dort sind. Bitte beachten Sie, dass die Fahrstühle im Falle eines Notfalls nicht genutzt werden können.

Sollten Sie zu irgendeinem Zeitpunkt Ihrer Reise den Notfallalarm auslösen müssen, zerbrechen Sie einfach das Schutzglas eines roten Feueralarmschalters in Ihrer Nähe. Dies löst einen Alarm auf der Brücke aus, das Signal ist nicht zu hören. Sollten Sie Fragen oder Bedenken haben oder weitere Informationen zu den Sicherheitsprozederen haben, melden Sie sich einfach bei den Kollegen an der Rezeption, diese helfen Ihnen gern.

*Wir wünschen Ihnen eine sichere Überfahrt.*

# Assembly Points & Lifejackets



## Savningarstøð

Í neyðstøðu skulu ferðafólkini fara til savningarstøðini. Hvørt savningarstað er merkt við einum ferhyntum skelti, ið er grønt og hvítt, og sum í hvørjum horni hevur ein píl, ið vendir inn móti einari mynd av einari familju.

**Skipið hevur fýra savningarstøð:**

- A Dekk 5 - Í trappuhøllini har frammi í skipinum og á bátadekkinum í bakborði
- B Dekk 5 - Í trappuhøllini har afturi í skipinum og á bátadekkinum í stýriborði
- C Dekk 6 - Í trappuhøllini har afturi í skipinum
- D Dekk 9 - Úti á sóldekkinum

Stytsta rýmingarleið til savningarstøðini er væl merkt við sjálvlýsandi merking.
Les meiri á kamarshurðini um nærmastu rýmingarleið.

## Assembly Points

In the event of an emergency, all passengers are required to gather at assembly points. Each assembly point is identified by a rectangular green and white sign with four arrows pointing inwards from every corner towards the image of a family.

**The ship has four assembly points:**

- A Deck 5 - By the forward stairway and port-side boat deck
- B Deck 5 - By the aft stairway and starboard-side boat deck
- C Deck 6 - By the aft stairway
- D Deck 9 - Out on the sundeck

The shortest escape route to each assembly point is clearly marked and luminescent, so it will remain lit up.
You will find further information about the nearest escape route on your cabin door.

## Sammelstationen

Bei einem Notfall müssen sich die Passagiere zu den Sammelstationen begeben. Jede Sammelstation ist mit einem rechteckigen weißgrünen Schild gekennzeichnet, auf aus jeder Ecke Pfeile nach innen auf den Umriss einer Personengruppe weisen.

**Das Schiff hat vier Sammelstellen:**

- A Deck 5 - Beim vorderen Treppenhaus und auf dem Backbord-Bootsdeck
- B Deck 5 - Beim achteren Treppenhaus und auf dem Steuerbord-Bootsdeck
- C Deck 6 - Beim achteren Treppenhaus
- D Deck 9 - Draußen auf dem Sonnendeck

Der kürzeste Fluchtweg zu einer Sammelstation ist deutlich durch Leuchtschilder gekennzeichnet.
Details zum kürzesten Fluchtweg entnehmen Sie bitte der Infotafel an Ihrer Kabinentür.






### Bjargingarvestar

Bjargingarvestar verða býttir út á savningarstøðunum.
Manningin kunnar um, hvussu bjargingarvesturin verður nýttur.

### Lifejackets

Lifejackets will be distributed at the assembly point.
Our crew will assist you on how to use the lifejacket.

### Rettungsweste

An den Sammelstationen werden Rettungswesten ausgehändigt.
Die Mannschaft zeigt Ihnen, wie Sie diese korrekt anlegen.

# First Aid

## Fyrstahjálp

Er tørvur á fyrstuhjálp? Kom so í móttøkuna ella sig tað við onkran av manningini í nánd. Vit eru altíð til reiðar at geva skjóta og serkøna hjálp, tá ið neyðstøður stinga seg upp.

Ert tú lækni ella serliga kønur í fyrstuhjálp, gev teg so til kennar, tá ið tú kemur umborð. Tín hjálp kann verða avgerandi, um okkurt er áfatt.

Umborð á Norrönu skulu øll hava tað gott og kenna seg trygg, meðan tey njóta vandaleysu ferðina. Tí heita vit á teg um at fylgja væl við trygdarávísingunum.

## First Aid

If you require first aid assistance, please don’t hesitate to contact our Reception Desk team or the nearest crew member. We are here to provide prompt and professional medical support in case of emergencies or injuries.

If you happen to be a doctor or medical professional, we kindly ask you to inform our Reception Desk team at the beginning of your journey.

Your expertise may be valuable in ensuring the health of our passengers during the voyage. Your safety and well-being are of the utmost importance to us, and we are committed to providing the necessary medicalcare and assistance when needed.

## Erste Hilfe

Wenn Sie erste Hilfe benötigen, zögern Sie bitte nicht, unser Rezeptionsteam oder das nächste Besatzungsmitglied zu kontaktieren. Wir sind hier, um Ihnen in Notfällen oder bei Verletzungen schnelle und professionelle medizinische Hilfe zu leisten. Falls Sie ein Arzt oder medizinisches Fachpersonal sind, bitten wir Sie, unser Rezeptionsteam zu Beginn Ihrer Reise zu informieren.

Ihr Fachwissen kann von unschätzbarem Wert sein, um das Wohlergehen unserer Passagiere während der Reise zu gewährleisten. Ihre Sicherheit und Ihr Wohlbefinden haben für uns höchste Priorität, und wir verpflichten uns, Ihnen bei Bedarf die notwendige medizinische Versorgung und Hilfe zukommen zu lassen.






## Øll kunnu uppliva okkurt umborð á Norrönu

| | |
|---|---|
| **Dekk 10** | Laterna Magica. Bara navnið fær ein at droyma seg burtur. Laterna Magica er glasparnassið ovast uppi á Norrönu; barrin við heimsins mest bergtakandi útsýni. Vit eru heilt uppi á dekki 10! |
| **Dekk 9** | Á dekki 9 kunnu ung sum eldri hugna sær. Her eru vit undir opnum himni. Á dekkinum er ein lítil fótbóltsvøllur til børn. Eisini hava vit borð og stólar, um tú vilt njóta útsýnið og frísku luftina eina løtu. Í tveimum kikarum sæst undranarverda lívið á sjónum. Útsýnið røkkur allan sjónarringin. |
| **Dekk 7** | Á dekki 7 eru heitu pottarnir við framúrskarandi útsýni yvir ísakalda Atlantshavið. Umborð á Norrönu fer einki til spillis. Rúmligu kørini, ið standa úti, verða nevniliga vermd við avlopshita úr maskinrúminum. Bílegg pláss í móttøkuni á dekki 5. |
| **Dekk 6** | Øll skip hava spæl at hiva við. Norröna hevur eisini spæl at spæla við. Á dekki 6 eru Playstations og flatskíggjar. Alt er sum gjørt til tannáringar. |
| **Dekk 5** | Nóatún er fólksliga matstovan á dekki 5. Her hava vit spælipláss til smærru børnini. Hinumegin skottið vísa vit film í biografinum. Í Undirhúsinum kanst tú lesa bøkur og leska tær á okkurt gott. Og á sama dekki er Sjóbúðin, ið selur tollfríar vørur. |
| **Dekk 1** | Vilt tú vera virkin og halda likamið viðlíka? Kom so niður á dekk 1. Her hava vit venjingarmiðstøð. Far ein stimbrandi svimjitúr í tilhoyrandi hylinum - og dusa tær í hitarúminum. Visti tú, at hesar tænastur eru ókeypis? |

## Onboard Experiences

| | |
|---|---|
| **Deck 10** | Experience the unique atmosphere of Laterna Magica on Deck 10, where you can take in stunning panoramic views of the sea and landscape in a peaceful and relaxed setting. |
| **Deck 9** | Let children and teenagers enjoy a game on our dedicated football pitch. You will also find two binoculars on this deck, perfect for observing life at sea and admiring the horizon. |
| **Deck 7** | Unwind with a beautiful view of the North Atlantic. Our outdoor hot tubs, heated using surplus energy from Norröna's engine room, offer a relaxing experience. Book your session at the reception. |
| **Deck 6** | PlayStation Room – Featuring flat screens and PlayStations, this space provides entertainment tailored to teenagers. |
| **Deck 5** | Visit the Nóatún Cafeteria, which includes a dedicated children's play area. Enjoy a movie at our onboard cinema next to the reception—tickets can be purchased at the reception. At Undirhúsið, you can dive into a good book or enjoy a cocktail. For shopping, be sure to visit Sjóbúðin. |
| **Deck 1** | Stay active in our fitness center, take a refreshing swim, or relax in the sauna. These facilities are available free of charge. |

## Unterhaltungsmöglichkeiten an Bord

| | |
|---|---|
| **Deck 10** | Laterna Magica. Tauchen Sie ein in die faszinierende Welt von Laterna Magica auf Deck 10 und genießen Sie atemberaubende Panoramablicke auf das umliegende Meer und die Landschaft, alles in einer ruhigen und entspannten Atmosphäre. |
| **Deck 9** | Lassen Sie die Kinder und Jugendlichen auf unserem Outdoor - Fußballplatz spielen. Auf diesem Deck finden Sie auch zwei Ferngläser, mit denen Sie die See und die Tierwelt beobachten und den Panoramablick über den Horizont genießen können. |
| **Deck 7** | Entspannen Sie sich mit einem atemberaubenden Blick auf den Nordatlantik. Unsere geräumigen Außen-Whirlpools werden mit überschüssiger Wärme aus dem Maschinenraum der Norröna beheizt. Buchen Sie Ihren Besuch an der Rezeption. |
| **Deck 6** | Teenager-Raum. Ausgestattet mit Flachbildschirmen und PlayStations bietet unser Teenager-Raum Entertainment speziell für Jugendliche. |
| **Deck 5** | Besuchen Sie die Nóatún Cafeteria, wo Sie den Innen-Spielbereich für Kinder finden. Genießen Sie einen guten Film in unserem Bordkino, das sich neben der Rezeption befindet. Tickets für das Kino können an der Rezeption erworben werden. Bei Undirhúsið können Sie sich in ein fesselndes Buch vertiefen oder einen köstlichen Cocktail genießen. Für fantastische Einkaufsmöglichkeiten sollten Sie unbedingt Sjóbúðin besuchen. |
| **Deck 1** | Bleiben Sie aktiv und trainieren Sie in unserem Fitnessraum, nehmen Sie ein erfrischendes Bad im Pool oder entspannen Sie sich in der Sauna. Diese Dienstleistungen sind für unsere Gäste kostenlos. |



# Skansagarður Buffet

### Vælumtókta sjálvtøkuborðið

Stóra og vælumtókta sjálvtøkuborðið bjóðar eitt fjølbroytt úrval av leskiligum rættum.
Góðskan og tænastan eru av tí besta. Fleiri rættir eru vegetariskir og uttan gluten og laktosu.

**Vit bjóða**
- Morgunmatarbuffet í serflokki.
- All-inclusive kvøldarbuffet við vatni, sodavatni, øl, víni, kaffi og té ad libitum.

### Quite the Treat to Look Forward To

Our popular buffet on deck 6 offers a varied selection of tasty dishes.
The quality and service is excellent. Several dishes are gluten-free, lactose-free and vegetarian.

**We offer**
- First class breakfast buffet.
- All-inclusive dinner buffet with water, soda, beer, wine, coffee and tea ad libitum.

### Etwas worauf man sich freuen kann

Unser beliebtes Buffetrestaurant auf Deck 6, bietet eine große und breit gefächerte
Auswahl an Speisen an. Die Qualität und der Service sind erstklassig.
Es werden mehrere glutenfreie, laktosefreie und vegetarische Gerichte angeboten.

**Angebotene Mahlzeiten**
- Umfangreiches Frühstücksbuffet
- All-inclusive Abendbuffet mit Wasser, Limonade, Bier, Wein, Kaffee und Tee nach Belieben.









# Nóatún Cafeteria



### Góður matur og lagaligir prísir

Miðmáli og nátturði verða borðreidd sum ein lítil buffet við góðum, vanligum mati og salati afturvið.

Tú kanst eisini keypa ymiskar heitar og kaldar cafeteria rættir, heimagjørdar køkur, snacks, sodavatn, øl, vín og kaffi.

### Tasty Meals and Favourable Prices

Lunch and dinner are served as a mini buffet offering good, ordinary food with salad.

You can also order different warm and cold cafeteria dishes, homemade cakes, snacks, soda, beer, wine and coffee.

### Leckere Gerichte und attraktive Preise

Tagesmenü Mittag und Abend werden als Mini-Buffet serviert und bieten gute, einfache Speisen und ein Salatbuffet.

An Bord können Sie außerdem verschiedene warme und kalte Cafeteria-Gerichte, sowie hausgemachte Kuchen, Snacks, Softdrinks, Bier, Wein und Kaffee bestellen.







# Munkastova Restaurant

## Norðurlendskar upplivingar í virðisløntari matstovu

Í heiðraðu gourmet-matstovu okkara, Munkastovu, er huglagið gott og norðurlendsku rættirnir mangir. Vit stremba eftir at brúka vistfrøðiligar og burðardyggar vørur úr okkara egna landi og havi.

**Vit bjóða**

» Frálíkan miðmála
» À la carte um kvøldið

*Vinarliga sig okkum frá, um tú hevur serligan kosttørv.*

## Nordic Culinary Experiences in award winning restaurant

Our award-winning restaurant Munkastova has a relaxed atmosphere and offers a fine selection of dishes from the Nordic cuisine. We strive to use organic, sustainable and local products.

**We offer**

» Exquisite lunch experience
» À la carte for dinner

*If you have any dietary requirements please let us know.*

## Nordisches Kulinarikerlebnis im preisgekrönten Restaurant

Unser preisgekröntes Restaurant Munkastova bietet in entspannter Atmosphäre eine feine Auswahl an Gerichten der nordischen Küche. Wir streben danach biologische, nachhaltige und regionale Produkte zu verwenden.

**Angebotene Mahlzeiten**

» Exquisites Mittagesserlebnis
» Abends à la carte

*Sollten Sie spezielle Ernährungsanforderungen haben, informieren Sie uns bitte.*





# Undirhúsið

Hugnaliga kaféin og barrin hjá okkum er á dekki 5. Her kanst tú lesa eina góða bók ella taka tær av løttum. Undirhúsið bjóðar góðar køkur og smárættir. Afturvið kanst tú fáa øl, vín, góðar drykkir, nýmalið kaffi og mangt annað. Her ber til at spæla borðspøl so sum talv, ludo og backgammon.

Undirhúsið is our cosy café and bar on Deck 5. This is the place to sit back with a good book and relax. Undirhúsið offers a variety of sweet and savory treats, including cakes and light meals, as well as a selection of beer, wine, drinks, and freshly ground coffee, just to name a few. Additionally, you can enjoy playing board games such as chess, ludo, and backgammon.

Undirhúsið ist unser gemütliches Café und Bar auf Deck 5. Dies ist der perfekte Ort, um sich mit einem guten Buch zurückzulehnen und zu entspannen. Undirhúsið bietet eine Vielzahl von süßen und herzhaften Leckereien, wie Kuchen und leichten Snacks, sowie eine Auswahl an Bier, Wein, Getränken, frischem Kaffee und vielem mehr. Darüber hinaus können Sie sich hier mit Brettspielen wie Schach, Ludo und Backgammon die Zeit vertreiben.






# Laterna Magica

## Framúrskarandi útsýnið yvir havsbrúnna

Laterna Magica er á dekki 10, 30 metrar omanfyri vatnskorpuna.
Hiðani kanst tú njóta framúrskarandi útsýnið yvir havsbrúnna, meðan vit sigla tvørtur um Atlantshavið.
Her kanst tú njóta frísktmalið, vistfrøðiligt kaffi, lekkrar munnbitar og eitt breitt úrval av drekkivørum.

## Spectacular Views of the Ocean Horizon

Laterna Magica is located on deck 10, 30 metres above sea level.
It offers spectacular views of the ocean horizon as we cross the Atlantic.
Here you can enjoy freshly ground organic coffee, delicious snacks, and a wide selection of drinks.

## Spektakulärer Blick über den Ozean

Laterna Magica liegt auf Deck 10, 30 Meter über dem Meer.
Während der Fahrt bietet sich hier ein spektakulärer Blick über den Atlantik.
Hier können Sie frisch gemahlenen Bio-Kaffee, köstliche Snacks und eine große Auswahl an Getränken genießen.



# Sjóbúðin

### Tax & Duty Free handilin umborð

Shoppingmøguleikarnir eru góðir umborð, og prísirnir eru kappingarførir. Stóra vøruúrvalið fevnir um alt frá vanligum tax-free vørum so sum góðgæti, vín, rúsdrekka, vakurleikarøkt og luktilsi, eins og klæðir til útilív og føroyskar ullvørur.

### Onboard Tax & Duty Free Shop

The shopping opportunities onboard are excellent, with competitive prices. The wide range of products includes everything from classic duty-free items —such as confectionery, wine, spirits, beauty products, and perfume—to outdoor clothing and Faroese wool goods

### Tax & Duty Free Shop an Bord

Das Angebot ist sehr umfangreich und vielfältig - und die Preise sehr attraktiv. Unser breites Sortiment umfasst neben den gängigen Duty Free Waren wie Süßwaren, Wein, Spirituosen, Schönheitsprodukten und Parfüm auch Outdoor-Bekleidung und färöische Wollwaren.



# Fitness & Swimming Pool

### Fitness, sauna & svimjihylur

Forkela kropp og sál á dekki 1. Her finnur tú fitnessrúmið, hitarúmið og svimjihylin. Har eru nógvar maskinur og amboð at venja við og á.
Hesar tænasturnar eru ókeypis at brúka.

### Swimming Pool & Fitness Area

Pamper your body and soul on deck 1, where you will find our fitness room, sauna, and swimming pool. There are several machines and tools available for training. These services are free to use.

### Schwimmbad, Sauna & Fitnessbereich

Verwöhnen Sie Ihren Körper und Ihre Seele auf Deck 1. Hier finden Sie unseren Fitnessraum, die Sauna und das Schwimmbad. Es gibt mehrere Trainingsgeräte und Maschinen zum Training. Diese Dienstleistungen sind kostenlos nutzbar.





# Onboard Guidelines

## Ein trygg og hugnalig uppliving

» Tað er bannað at brúka opnan eld, sum t.d. kókibúnað.
» Royking er bert loyvd í roykirúminum á dekki 9.
*Brot á hesa reglu verður revsað við kr. 1.500.*
» Onki burturkast skal tveitast fyri borð.
» Hav altíð eyguni eftir børnunum.
» Læs hurðina, tá ið tú fert úr kamarinum.
» Ikki er loyvt at hava húsdjór í kamarinum.
*Brot á hesa reglu verður revsað við kr. 3.000.*
» Eingin atgongd er til bildekkið, meðan siglt verður.

## Ensuring a Safe and Enjoyable Experience

» The use of open fire – such as cooking equipment – is prohibited.
» Smoking is only allowed in the smoking area on deck 9.
*Any violation of this rule will result in a fine of € 200.*
» Never throw litter overboard.
» Children must always be supervised.
» Never leave your cabin unlocked.
» Pets are not allowed in the cabin.
*Any violation of this rule will result in a fee of € 400.*
» Access to the car deck is not allowed during the crossing.

## Gewährleistung eines sicheren und angenehmen Erlebnisses

» Der Gebrauch von offenem Feuer – zum Beispiel zum Kochen – ist streng verboten.
» Das Rauchen ist nur im Raucherbereich auf Deck 9 gestattet.
*Jeder Verstoß gegen diese Regel führt zu einer Strafe von € 200.*
» Werfen Sie keine Abfälle von Bord.
» Lassen Sie Ihre Kinder nicht unbeaufsichtigt.
» Verschließen Sie Ihre Kabine, wenn Sie diese verlassen.
» Haustiere sind in der Kabine verboten.
*Jeder Verstoß gegen diese Regel führt zu einer Strafe von € 400.*
» Die Autodecks sind während aller Überfahrten geschlossen.





## Skipa lýsing

| | |
|---|---|
| Longd | 165,74 m |
| Breidd | 30,00 m |
| Deyðvekt | 6.350 t |
| Ferð | 21 míl |
| Høvuðsmotorar | 29.348 HK |
| Bógvskúvur | 4.755 Hk |
| Ferðafólkatal | 1.482 |
| Manning | 118 |
| Bildekk - Bilar | 800 |
| Bildekk - Trailarir | 130 |
| Tyrlupallur | |
| Stabilisatorar | |

## Kømur

| | |
|---|---|
| Nordic svita | 2 |
| Nordic luksuskamar | 34 |
| Norröna svita | 1 |
| Luksuskamar við dupultsong/útsýni | 12 |
| 2-koyggjukamar við dupultsong/útsýni | 27 |
| 2-koyggjukamar við undirkoyggju/útsýni | 48 |
| 3-koyggjukamar | 16 |
| 3-koyggjukamar við útsýni | 50 |
| 4-koyggjukamar við útsýni | 31 |
| 4-koyggjukamar fyri rørslutarnað | 6 |
| 4-koyggjukamar | 133 |
| Familjukamar við útsýni | 5 |
| 6-koyggju couchett | 30 |

## Ship Details

| | |
|---|---|
| Length over all | 165,74 m |
| Beam | 30,00 m |
| Dead weight | 6.350 t |
| Service Speed | 21 knot |
| Main engines | 29.348 BHP/HP |
| Bow Thruster | 4.755 BHP/HP |
| Passenger Capacity | 1.482 |
| Crew | 118 |
| Car Deck Capacity - Cars | 800 |
| Car Deck Capacity - Trailers | 130 |
| Helicopter Pad | |
| Stabilizers | |

## Cabins

| | |
|---|---|
| Nordic Suite | 2 |
| Nordic Deluxe | 34 |
| Norröna Suite | 1 |
| Deluxe outside | 12 |
| Outside cabin with double bed | 27 |
| 2-berth outside | 48 |
| 3-berth inside | 16 |
| 3-berth outside | 50 |
| 4-berth outside | 31 |
| 4-berth outside disabled | 6 |
| 4-berth inside | 133 |
| Family cabin outside | 5 |
| 6 persons couchettes inside | 30 |

## Technische Angaben

| | |
|---|---|
| Gesamtlänge | 165,74 m |
| Breite | 30,00 m |
| Gesamtgewicht | 6.350 Tonnen |
| Reisegeschwindigkeit | 21 Knoten |
| Hauptmaschinen | 29.348 BHP/HP |
| Bugstrahlruder | 4.755 BHP/HP |
| Passagierkapazität | 1.482 |
| Besatzung | 118 |
| Fahrzeugkapazität - PKW | 800 |
| Fahrzeugkapazität - Trailer | 130 |
| Hubschrauberlandeplatz | |
| Stabilisatoren | |

## Kabinen

| | |
|---|---|
| Nordic Suite | 2 |
| Nordic Deluxe | 34 |
| Norröna Suite | 1 |
| Luxuskabine Außen | 12 |
| Außenkabine mit Doppelbett | 27 |
| 2-Bett Außenkabinen | 48 |
| 3-Bett Innenkabine | 16 |
| 3-Bett Außenkabine | 50 |
| 4-Bett Außenkabine | 31 |
| 4-Bett Behindertenkabine Außen | 6 |
| 4-Bett Innenkabine | 133 |
| Familienkabine Außen | 5 |
| Liegeabteil mit 6 Liegen | 30 |

**P/F Smyril Line**
Yvir við Strond 1
Postbox 370
110 Tórshavn
Faroe Islands